
Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum hevur funnið gass í Ivory-brunninum

**Jógvan Hugo Gardar**

02.12.2014 - 12:15

Oljan.fo

Atlantic Petroleum boðar í morgun frá at tey hava funnið gass í Ivory-brunninum sum liggur á Norðhavinum, ella Norskahavinum sum norðmenn kalla tað. Sum skilst er gasslindin um 12 metrar tjúkk.

- Um gassið letur seg gera at útvinna vinnuliga, so verður tað eftir øllum at døma knýtt til Statoil-ætlanina Aasta Hansteen-økið, ið liggur einar 20 kilometrar í einlandsynning frá Ivory, og sum byrjar sína framleiðslu í 2017, skrivar Atlantic Petroleum í síni fráboðan til keypsskálan. Tað er boripallurin West Navigator sum hevur staðið fyri royndarboringini. Proppur verður nú settur í.

Atlantic Petroleum eigur níggju prosent í loyvinum. Tað er Centrica sum er fyristøðufelag við einum ognarparti uppá 40 prosent. Statoil eigur 25 prosent, Wintershall 10 prosent, Rocksource Exploration Norway 10 prosent og Repsol seks prosent.

- Vit eru sera væl nøgd við at hava funnið gass í Ivory-brunninum. Tað vit hava funnið nú verður kannað víðari, og skal vera grundarlag fyri avgerðini og metingini av hvussu nógv kann fáast burturúr brunninum, ið liggur stutt frá Aasta Hansteen, sigur Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Hann leggur afturat at felagið er nøgt við samstarvið við Centrica, ið er ein fyritøka sum Atlantic Petroleum hevur samstarva við á øðrum leitiøkjum eisini